# Jógvan klárað seg betur enn væntað



*Jógvan á Lakjuni var í góðum hýri, tá ið hann bjóðaði rundstykki í Mentamálaráðnum hósmorgunin. Orsøkin var eitt ára dagurin sum landsstýrismaður*
*Mynd: Bárður Lydersen*

**– Jógvan á Lakjuni er tann landsstýrismaðurin í hesari samgonguni, sum hevur yvirraskað mest positivt, heldur ein fyrrverandi landsstýrismaður við mentamálum. Hósmorgunin helt Jógvan á Lakjuni eitt ára dagin**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Jógvan á Lakjuni bjóðaði rundstykki í Mentamálaráðnum hósmorgunin. Høvið var, at hann hevði sitið í eitt ár sum landsstýrismaður í einum ráði, sum í fleiri ár var merkt av støðugari útskifting og nógvum ófriði.

– Eg haldi, at tað var vert at markera, at eg havi verið landsstýrismaður í eitt ár – eisini fyri at minna fólk á, hvussu skjótt tíðin gongur. Tað virkar, sum eg tók við í gjár, sigur Jógvan á Lakjuni.

Síðani Eilif Samuelsen sat sum landsstýrismaður í mentamálum fram til 1998, hevur tað verið ein støðug útskifting av landsstýrismonnum í hesum ráðnum. Signar á Brúnni helt í umleið tvey ár, men síðani 2000 hava politikarar sum Tórbjørn Jacobsen, Høgni Hoydal, Annlis Bjarkhamar og Annita á Fríðriksmørk sitið í styttri tíðarskeið.

## Baklandið er hornasteinurin

*Fyrstu ferð síðani 2000 kann ein landsstýrismaður við mentamálum halda sín eitt ára dag. Hvat hevur tú gjørt fyri at sita so leingi?*

– Tað veit eg ikki. Tað kunnu onnur betur meta um enn eg. Kanska er tað tí, at tað hevur valdað góður friður í samgonguni sum heild. Hornasteinurin er altíð, at politiska baklandið er í lagi, og at tú hevur undirtøku fyri tí, sum tú gert, sigur Jógvan á Lakjuni.

– Orsøkin til, at tað hevur verið góður friður hetta árið, er ikki, at einki er hent. Vit hava avgreitt fleiri stór mál – millum annað samanleggingar av skúlum og loftmiðlum. Tað politiska abc'ið er, at áðrenn tú fert í holt við nakað, mást tú hava tryggjað tær undirtøku fyri tí, og tú skalt fyrireika málini væl, áðrenn tú meldar nakað út. Tað havi eg roynt at gjørt mær ómak við.

## Tobbi imponeraður

Ein av politikarunum, sum hevur verið landsstýrismaður við mentamálum í eina tíð seinastu árini, er Torbjørn Jacobsen. Hann heldur, at Jógvan á Lakjuni hevur klárað sína uppgávu væl.

– Eg plagdi at halda, at Jógvan á Lakjuni sum framsøgumaður í mentamálum ofta úttalaði seg um mál uttan at virka sannførdur um tað, sum hann hevði at bera fram. Men sum landsstýrismaður hevur hann klárað seg væl.

– Jógvan á Lakjuni er tann landsstýrismaðurin í hesari samgonguni, sum hevur yvirraskað mest positivt. Hann hevur klárað at tikið avgerðir, sum hann hevur hildið fast um, og uttan at fólk eru farin at gartera um tað, sigur Torbjørn Jacobsen.




Vinnuhúsið søkir samskipara

Fá vinnuna at spíra

Vinnan hevur brúk fyri fólki við visjónum. Í hesum anda søkir Vinnuhúsið eftir samskipara at arbeiða við vinnumálum.

Hevur tú sjónir um, hvussu vit menna møguleikarnar hjá vinnuni? Vilt tú vera við til at fáa verandi vinnur framá og fáa nýggjar spírar at næla? Og megnar tú bæði at arbeiða breitt og fara í dýpdina? So er tað tær, vit sóknast eftir.

Arbeiðsøkið hjá vinnusamskiparanum fevnir um vinnuviðurskifti í breiðum týdningi. Tú kemur at luttaka í arbeiðsbólkum og nevndum, ið viðgera karmar og viðurskifti hjá vinnuni. Mál skulu lýsast, og tú skalt framleiða kanningar og frágreiðingar. Lógir og kunngerðir, ið ávirka vinnuna, skulu leggjast undir luppin, og tú verður við í fyriskipan av vinnuligum tiltøkum og átøkum. Harafturat skalt tú røkja málsviðgerð og skrivarauppgávur fyri nevndir í vinnugreinafeløgunum.

Alt hetta krevur eitt ávíst samskifti við myndugleikarnar og serliga eitt tætt samstarv við vinnuna í Føroyum.

Vit vænta, at tú hevur hægri útbúgving, arbeiðsroyndir og fingurin á føroyska vinnupulsinum. Tú hevur góð samstarvsevni og arbeiðir bæði miðvíst og sjálvstøðugt. Tú orðar teg væl á føroyskum, norðurlendskum og enskum.

Hevur tú hesar eginleikar bjóða vit tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv í einum mennandi arbeiðsumhvørvi, har tú verður løntur eftir nærri avtalu.

Skrivlig umsókn við frámerkinum "starv" skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. februar 2005.
Vilt tú vita meira, kanst tú ringja til stjóran, Jan Mortensen, á telefon 30 99 00.

Føroya Arbeiðsgevarafelag
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038
FO-110 Tórshavn

www.sansir.fo